# RENNIDAGURIN 2023

So verður aftur árligi rennidagurin, sum Føroya ítróttalærarafelag skipar fyri. Eysturskúlin fer at renna fríggjadagin 06. 10. 2023 um viðrar. Vit fylgja við, hvussu veðrið háttar sær og framskunda renningina um tørvur er á tí.

Renningin byrjar við klokkuna, sum stendur við Tórsgarðsgøtu, eftir upphitingina. Í renningini ræður tað um at samla so nógvar kilometrar til flokkin, sum til ber. Kl. 11.45 verður rutan stongd. Hetta merkir, at eingin næmingur sleppur at byrja ein nýggjan túr, eftir at klokkan hevur sligið 11.45.

Aftur í ár verður skúlarenningin skipað sum ein kapping millum flokkarnar í deildunum. Tann flokkurin vinnur, har næmingarnir í miðal renna flest kilometrar.

Kappingin er skipað soleiðis:

- Grunddeild: 1.-3. flokkur kappast
- Miðdeild: 4.- 6. flokkur kappast
- Hádeild og NámX: 7.-9. flokkur og nakrar breytir í NámX kappast. Hinar breytirnar skipa fyri stuttligum innsløgum á rennirutini.



**Vinnandi flokkarnir vinna ein bovlingtúr og fáa eitt ferðasteyp at stilla í stovuna.**

**Skráin fyri dagin:**

| | |
|---|---|
| 08:00 - 09:15 | Tímatalvan verður fylgd. Taka felagsmynd í flokkinum. |
| 09:15 – 09:30 | Fríkorter |
| 09:30 – 09:45 | Upphiting í Stóragarði |
| 09:45 | Skúlarenningin byrjar við klokkuna, sum stendur við Tórgarðsgøtu. |
| 11.45 - 12.30 | Tit fáa sunkist og skreytbløð í skúlahøllini. |
| 12.30 | Øll møta í skúlahøllini og vinnararnir í teimum trimum deildunum verða kosnir. Tá vinnararnir eru kosnir er dagurin liðugur, og tit fáa heystferiu. |

